# Heiðursbræv

## Heiðursgáva landsins 2024

verður latin

## Randi Ward

týðara

Randi Ward úr West Virginia í USA er fremsti týðarin av føroyskum samtíðarbókmentum til enskttalandi heimin seinastu tjúgu árini. Randi Ward er útbúgvin MA frá Fróðskaparsetri Føroya.

Sum ein savnandi hornasteinur innan føroyskar bókmentir hevur Randi Ward sett føroyskar bókmentir í eygnahædd við samtíðarbókmentir heimsins. Hon hevur tvær ferðir vunnið American-Scandinavian Foundation's Nadia Christensen Prize, ið verður givin fyri framúrskarandi týðing av skaldskapi úr einum norðurlendskum máli til enskt.

Randi Ward hevur týtt verk eftir føroyskar høvundar so sum Guðrið Helmsdal, Steinbjørn B. Jacobsen, Tórodd Poulsen, Marjun S. Kjelnæs, Sissal Kampmann og Oddfríða M. Rasmussen.

Randi Ward hevur skrivað greinar um føroyskar høvundar til forløg, tíðarrit og antologiir um allan heim, eitt nú í Asymptote, World Literature Today og Poetry From the Edge of Extinction, útgivin í London um 50 hótt smámál í heiminum í dag.

Universitetsbókasavnið á víðagitna Cornell University gjørdu í 2015 eitt serligt savn kallað The Randi Ward Collection ella "Randi Ward Savnið", ið savnar føroyskar týðingar og myndir, sum Randi Ward hevur tikið, serliga á útoyggj í Føroyum.

Randi Ward, týðari, fær Heiðursgávu Landsins fyri 2024 fyri sítt áhaldandi arbeiði og stóra hegni at týða og gera vart við føroyskan skaldskap í útheiminum.

Sirið Stenberg, landsstýriskvinna

23. oktober 2024